Cannavaro til Juventus

Líkt er til, at italski verjuspælarin Fabio Cannavaro skiftir til Juventus at spæla í summar. Cannavaro er sáttmálabundin í Real Madrid, í gjár var Cannavaro heima í Italia fyri at verða kannaður lækna, áðrenn sáttmáli verður gjørdur við Juventus. Cannavaro skifti frá júst Juventus til Real Madrid í 2006, og nú gongur leiðin eftir øllum at døma heimaftur.

Birmingham aftur í Premier League

Seinasta umfar var í næstbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Birmingham hevði truplan útidyst ímóti Reading, og liðið, sum vann dystin í dag, flutti upp í Premier League. Birmingham legði seg á odda 2-0, men so minkaði Reading um munin. Hóast trýst frá Reading seinastu løtuna, so helt.

B36-HB 2-2 (1-1):

Favorittarnir betur nøgdir

B36

HB

HB hevði fyri steðgin allar møguleikar at avgera grannauppgerðina í Havn. Men tá alt kom til alt mundu reyðu favorittarnir vera betur nøgdir um javnleikin

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tvær málgevandi hornasparksstøður bjargaðu HB eitt stig í grannauppgerðini móti B36 sunnudagin.

Ein javnleikur var annars ikki tað, sum HB-viðhaldsfólkini høvdu sett sær fyri undan dystarbyrjan, og fyrsta hálva tíman ella so var heldur einki, sum bendi á, at HB ikki skuldi taka sær av stigunum á degnum.

Snøgt sagt, so var klassamunur á báðum liðunum hesa longu løtuna. B36 hevið valt eitt varisligt útgangsstøði, sum bar við sær, at teir lógu djúpt á egnari hálvu og bíðaðu eftir møguleikanum at kontra.

Stóri trupulleikin í hesum var tó, at HB hevði alt ov gott tamarhald á sínum pasningsspæli. Bólturin ferðaðist skjótt runt á B36-hálvuni, og ofta restaðu ofta bara sentimetrar, áðrenn avgerandi møguleikin kom. Og tá hesin loksins kom, hevði Tróndur Vatnhamar eina framúr refleksbjarging, tá Fróði Benjaminsen høgdi til úr fýra metrum.

Lønina fekk HB tó, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Hornasparksinnlegg ferðaðist inn í málteigin, og har var Fróði Clementsen óheppin og beindi bóltin inn um strikuna.

Mistu ferðina

Sum tað so ofta er sæð fyrr, so gav málið tó baksláttur hjá HB.

Um tað var harða dystarskráin við triðja dystinum í eina viku, ella um spælararnir bara góvu sær sjálvum loyvi til at taka sær av løttum, skal vera ósagt. Men næsta lítla tíman misti HB fullkomuliga takið á dystinum, sum teir annars høvdu havt í pottinum.

1-1 málið var eisini úrslit av hesum. Í fyrstu atløgu fekk Sam Malson bæði tíð og pláss, so hann kundi royna seg við skoti. Símun Rógvi var ikki nóg ansin, tá hann pareraði skotið beint út í spæl heldur enn út til horna, og so var eingin HB'ari eins vakin sum Brima Koroma, sum var fyrstur á og potaði í netið til javnleik.

Og tað skuldi blíva enn verri hjá HB. Hóast teir framvegis vóru liðið, sum hevði bóltin meira, so var tað nú alt meira B36, sum setti dagsskránna. Tíðliga í seinna hálvleiki fall revsingin eisini, tá rangstøðufellan kiksaði uppi á miðjum vølli.

Róaldur Jacobsen hevði kanska ikki sín besta dyst fyri B36, men hann var ískaldur, tá fyrst setti Hans á Lag av við knappari vending, og so fekk Símun Rógvi Hansen bert nortið við bóltin, sum kortini ferðaðist í meskarnar.

Elsti maður bjargaði

At tað kortini eydnaðist HB at koma aftur, vísti hóast alt, at tað búgva sterkar dygdir í liðnum.

B36 hevði annars nakrar støður afturat, sum kundu givið mál av sær, tá teir kontraðu móti alt meira satsandi mótstøðuni. Men teir komu ikki stórt nærri enn einum næstan-sjálvmáli, tá Mortan úr Hørg akkurát megnaði at skreiða bóltin upp um egið mál og til hornaspark.

Í hinum endanum hevði HB framvegis ilt við at skapa sær opnar møguleikar, men tíggju minuttir undan leikloki fingu teir lønina. Enn einaferð var hornasparksstøðu lykilin. Hans á Lag var kanska elstur á vøllinum, men hann var eisini hægstur við handara stólpa, tá Rasmus Nolsøe sendi innfyri, og so var Lag á Hans at stúta í mest sum manntóma málið, tá Tróndur Vatnhamar gleið í síni roynd at koma úr málinum.

Og so var HB kortini heilt nær við at skora sigursmálið í yvirtíðini. Fróði Benjaminsen slapp at standa púra blankur í brotsteiginum, tá eingin tordi at tackla, men við eini framúrskarandi bjarging fekk Tróndur Vatnhamar parera royndini frá HB-liðskiparanum, sum saman við liðfeløgunum mátti taka til takkar við einum stigi.

Og tað var nú ikki tað, sum HB hevði sett nøsina upp eftir á degnum. Men givið at teir stóran part av seinna hálvleiki vóru aftan fyri við einum málið, mundu teir kortini vera teir, sum vóru best nøgdir við javnleikin.

Veteranurin hjá HB og elsti maður á vøllinum tryggjaði HB eitt stig, tá hann tíggju minuttir undan leiklokti stútaði hornaspark í netið

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Harmaðist hornaspørkini

Mikkjal Thomassen, B36-venjari, var ikki serliga væl nøgdur um, at hansara menn tvær ferðir lótu HB skora eftir hornasparksstøður.

- Hatta var nakað, sum vit høvdu brúkt nógva tíð upp á í vikuni. Vit vita, at teir eru vandamiklir við hornaspark. Ikki minst tá Rasmus sparkar úr høgru. Og vit høvdu gjørt greiðar avtalur um, hvussu vit skuldu dekka upp, og hvussu allir menn skuldu flyta seg í slíkum støðum, men kortini skora teir, og so er tað keðiligt at taka til takkar við javnleikinum, helt Mikkjal Thomassen.

Merkir hesin javnleikurin, at B36 hóast alt er til reiðar at spæla við í dystinum móti teimum bestu?

- Vit fara ikki at rópa hart um, at vit skulu vera nummar eitt ella tvey. Tað hava vit umstøður til í løtuni. Men vit hava ein góðan hóp, sum kanska ikki er so breiður og dýrur sum hjá fleiri av hinum liðunum. Og vit vilja arbeiða knallhart fyri at fáa so góð úrslit, sum tað ber til at fáa. Men vit ætla okkum altso ikki at skapa nakað trýst móti okkum sjálvum við at rópa hart um nakran málsetning, staðfestir B36-venjarin.

-mørk

Ov tungir

Hóast nøgdsemið ikki alla staðni var eins stórt í HB-skiftirúminum, so noktaði venjarin, Sámal Erik Hentze, at sveiggja seg upp til tað heilt stóra, tá hann eftir dystin gjørdi sínar viðmerkingar um teir 90 minuttirnar, sum hann hevði verið vitni til.

- Eg haldi, at vit tóktust nakað tungir í spælinum, og tað kemst helst av, at hetta var triði dysturin seinastu vikuna. Vit byrja sera væl, men vit megna ikki at halda ferðini uppi á spælinum, og vit skulu hava ferð á bóltinum, um vit skulu vera vandamiklir, segði Sámal Erik Hentze.

Men kunnu tit vera nøgdir við javnleik í einum dysti, har tey flestu høvdu tykkum sum greiðar favorittar?

- Tá tú ert aftanfyri, so er tað positivt, at tú hóast alt megnar at fáa javnleik. Tað er positivt fyri okkum, at vit klára at koma afturíaftur, og tað er tað, sum vit kunnu brúka hendan dystin til. Hvør er favorittur, tími eg ikki at gera nakra viðmerking til. Eg haldi kappingina vera somikið javna, at tað er vónleyst at tosa um favorittar. Og í so máta mugu vit bara royna at gera okkara, tá vit eru á vøllinum, segði Sámal Erik Hentze.

-mørk